

*- Eitt politiskt starv er óvist, og eg veit ikki, hvussu støðan hjá mær hevði verið aftaná valið um átta mánaðir. Kanska hevði eg endað sum ein løgtingsmaður í andstøðu, og tað havi eg eisini hugsað um í sambandi við hesa avgerðina, sigur Bárður Nielsen*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

# Ov ótolin til politikk

**- Politiska arbeiðið er onkuntíð í so tungt og passar ikki so væl til mítt lyndi. Tað er ofta langt frá einum hugskoti til at føra tað út í lívið, og eg vil hava ting at henda skjótt, sigur Bárður Nielsen, sum í dag hevur lagt frá sær sum landsstýrismaður við fíggjarmálum**

POLITIKKUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Tá ið telefonin hjá Bárði Nielsen ringdi mánakvøldið 23. apríl, var tað ikki ein misnøgdur veljari, sum var í telefonini hjá landsstýrismanninum. Tað var hinvegin vinnulívsmaðurin Jákup á Dul, sum svimur millum stórar fiskar í altjóða vinnulívi.

Hann vildi vita, um landsstýrismaðurin hevði tikið av, um hann hevði fingið tilboðið um at gerast stjóri fyri risastóru verkætlanini Stórutjørn.

- Eg hevði ikki søkt starvið og hevði ikki hugsað um tað, fyrr enn eftir hesa samrøðuna. Fyrsti tankin var, at fór ikki at taka av, men eftir at eg hevði hugsað meg um, kom eg til ta niðurstøðuna, at eg kundi ikki siga nei til avbjóðingina, sigur Bárður Nielsen.

- Hetta var ein stór og trupul avgerð, men hon er tikin. Eg taki meg tí úr politikki og fari at royna meg aftur í privata vinnulívinum, sigur hann.

### Politiskt punktum

Tað kom rættiliga óvart á fólk, tá ið Bárður Nielsen mikumorgunin kallaði inn til tíðindafund í Fíggjarmálaráðnum á Argjum.

Hetta var ikki árligi samankomsturin, har landsstýrismaðurin leggur fram fíggjarlógina, og tølini flúgva um oyruni á tíðindafólki. Hesaferð var ein nógv meira persónlig fráboðan á skránni, og tá ið Bárður Nielsen ein minutt eftir klokkan tíggju steig inn í hølini, har tíðindafundurin var hildin, var tað fyri at seta eitt fyribils punktum fyri sínari politiskari yrkisleið.

- Eg leggi frá mær sum landsstýrismaður, vóru fyrstu orðini frá Bárði, og fráboðanin fór flúgvandi kring alt landið í beinleiðis útvarpi.

- Tað hevur verið eitt sera spennandi starv at verið landsstýrismaður, og eg eri fegin um, at tað hevur eydnast okkum at venda búskapargongdini í landinum, meðan eg havi verið í fíggjarmálaráðnum, segði Bárður Nielsen, sum ikki var beskeðin um síni politisku avrik seinastu stívliga trý árini.

### Ov ótolin til politikk

Bárður Nielsen hevur grundað nógv um sína støðu, áðrenn hann tók avgerðina um at fara úr politikki og kasta seg yvir eina nýggja avbjóðing í vinnulívinum.

- Eg havi trivist væl í politiska umhvørvinum, og áðrenn eg fekk hetta tilboðið, hevði eg als ikki hugsað um at gevast í politikki. Eg kann so eisini siga, at politiska arbeiðið onkuntíð er í so tungt og passar ikki so væl til mítt lyndi. Tað er ofta langt frá einum hugskoti til at føra tað út í lívið, og eg vil hava ting at henda skjótt, sigur Bárður Nielsen.

- Hinvegin havi eg eisini gjørt mær greitt, at eitt politiskt starv er óvist, og eg veit ikki, hvussu støðan hjá mær hevði verið aftaná valið um átta mánaðir. Kanska hevði eg endað sum ein løgtingsmaður í andstøðu, og tað havi eg eisini hugsað um í sambandi við hesa avgerðina, sigur Bárður Nielsen.

### Løgmansdreymurin sleptur

Vil tað siga, at tú sleppur ambitiónunum um at gerast floksformaður og løgmaður?

- Eg havi fingið áheitanir um at stilla upp til formansvalið í Sambandsflokkinum, men eg havi hildið, at eg hevði ikki nóg mikið av royndum til at bjóða meg fram.

- Eg vil gjarna royna meg fult út, har eg eri, og í politikki er tað at gerast løgmaður, men eisini har mangli eg politiskar royndir og lívsroyndir. Nú gevist eg fyri fyrst í politikki, men eg fái ikki sagt nakað um, hvat framtíðin kemur at bjóða á politiska økinum.

Bárður Nielsen fekk 358 atkvøður á løgtingsvalinum í 2004. Hann stillaði upp í Norðstreymoy og varð valdur í løgtingið. Meðan Bárður Nielsen hevur verið landsstýrismaður, hevur Olav Enomoto verið varamaður á tingi.

## FAKTA

**Navn:** Bárður á Steig Nielsen
**Aldur:** 35 ár
**Familja:** Giftur við Rakul Nielsen – tey eiga fýra børn
**Útbúgving:** HD, fyrsta part og ávís fak innan merkonom
**Størv:** Landsstýrismaður við fíggjarmálum síðani februar 2004, roknskaparleiðari hjá Kollafjord Pelagic frá 2001 til 2004, grannskoðari hjá P/F Rasmussen og Weihe frá 1993-2000.

---

Heðin Mortensen, borgarstjóri í Havn:

# Tingsessurin er mín

**Alt er so nýtt fyri meg enn, at eg havi ikki fingið hugsað meg rættiliga um. Eg má lodda dýpið hjá mínum veljarum og serliga hjá familjuni. Men eg síggi nógvar spennandi avbjóðingar í tingsessinum, sigur Heðin Mortensen**



*Valdur á Sambandslistanum – á ting fyri Javnaðarflokkin. Tað verður eftir øllum at døma veruleikin hjá Heðini Mortensen, borgarstjóra í Havn.*

*savnsmynd*

POLITIKKUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Eftir at Sambandsflokkurin allan morgun hevur tingast um ein nýggjan landsstýrismann, gjørdist úrslitið sum væntað, at formaður floksins, Kaj Leo Johannesen verður nýggjur fíggjarmálaráðharri. Hetta merkir pr. defenitión, at næsti maður á listanum hjá Sambandsflokkinum í Suðurstreymoy kemur á ting fyri hann. Og næsti maður á listanum er Heðin Mortensen, borgarstjóri í Havn.

Og hetta er ein serlig støða, tí eftir seinasta býráðsval skifti Heðin Mortensen, flokk, og fór úr Sambands- yvir í Javnaðarflokkin. Og sum limur í seinni nevnda gjørdist hann borgarstjóri í Havn.

Tað merkir so í stuttum, at við at fara í starv sum fíggjarmálaráðharri, hevur formaðurin óbeinleiðis minka um tingmannatalið hjá Sambandsflokkinum, meðan Javnaðarflokkurin veksur við einum.

Heðin Mortensen hevði júst frætt tíðindini, tá Sosialurin um miðdagsleitið tosaði við hann, og hóast borgarstjórin í Havn eyðvitað ikki hevði havt stundir at hugsa seg um, so var hann ikki í iva um, hvørt átti sessin hjá Kaj Leo Johannesen.

- Sum næsti maður á listanum er tingsessurin mín, antin ein vil tað ella ei, sigur Heðin Mortensen.

### Kann gera nyttu

Hann var á ongan hátt avvísandi um at taka við tingsessinum, og heldur enn at síggja trupulleikar við at hava tvey so týðandi størv, sá hann fleiri møguleikar í, bæði at vera tingmaður og borgarstjóri.

- Hetta ljóðar sum ein spennandi avbjóðing. Tað eru nógvir møguleikar at gera seg galdandi í tinginum, tí tað er í tinginum, at landsins lógir verða smíðaðar, sigur Heðin Mortensen.

Og hóast borgarstjórin í Havn ikki hevur tikið nakra endaliga støðu enn, so nevnir hann mál, ið liggja honum nær at hjarta, og sum hann sum tinglimur fær stóra ávirkan á – eitt nú eldraøkið.

- Tingið fer nú til hús og kemur ikki saman aftur fyrr enn á Ólavsøku, so eg havi góðar stundir at hugsa meg um. Eg má eisini lodda dýpið hjá veljarum mínum, eins og familjan fær eitt avgerandi orð at siga, sigur Heðin Mortensen.

Men hann undirstrikar við tjúkkari striku, at einginkann taka tingsessin frá honum.

Tingfólk verða vald á flokslistum, men tey verða vald við persónligum atkvøðum, og tá Kaj Leo Johannesen nú fer at biðja løgtingsformannin um farloyvi og at næsti maður á listanum kemur á ting, so er næsti maður altso – Heðin Mortensen.